# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvsetanir og -dagar.

## Føðingar

26. mars fingu Heidi og Bogi Næs, Hvalba, tvíburar, gentur. Onnur var 48 cm long og vigaði 2910 gr, hin 44 cm long og vigaði 1740 gr.



*3. apríl fingu Anna T. og Hans F. Mikkelsen, Kambsdali, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3350 gr. Hann eitur Signar.*

4. apríl fingu Jan og Súsanna Sigurðsson, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3900 gr.

4. apríl fingu Maria Jacobsen og Ernst á Kósini, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

5. apríl fingu Erla Egholm og Egil Bech Petersen, Porkeri, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4350 gr.

5. apríl fingu Beinta Wilhelm, Tórshavn, og Brian Jensen, Norðskála, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4575 gr.

7. apríl fingu Tina Jacobsen og Heðin Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4050 gr.

7. apríl fingu Guðrun og Stig Elttør, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3600 gr.

8. apríl fingu Durita Eliasen og Jesper Engedal, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

8. apríl fingu Anna Petersen og Christian Danielsen, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3250 gr.

8. apríl fingu Annika Fossá og Hans Petur í Brekkunum, búsitandi í Århus, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3370 gr.

9. apríl fingu Eyðrit Gøthe og Jacob Martin Jacobsen, Syðrugøtu, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2850 gr.

9. apríl fingu Ansa í Eyðansstovu og Fróði B. Skúvadal, Herlev, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3850 gr.

10. apríl fingu Ingrid Nielsen, Argjum, og Erlingur Ellendersen, Trongisvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3200 gr.

10. apríl fingu Marita Mørk Johannesen og Martin Jóanesarson, Argjum, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4050 gr.

11. apríl fingu Adelaid og Petur Kirke, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2700 gr.

11. apríl fingu Sigrun og Torleif Nón, Rituvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3950 gr.

11. apríl fingu Bergtóra Joensen og Helgi Bech, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

12. apríl fingu Jónrid Jensen og Ingolf Joensen, Skála, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3850 gr.

13. apríl fingu Katrin og Tórður Patursson, Kirkjubø, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4250 gr.

13. apríl fingu Tinna og Jákup Johansen, Toftum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

15. apríl fingu Frida Lamhauge og Terji Nielsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4150 gr.

15. apríl fingu Poula og Njal Reinert-Petersen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4050 gr.

# Dánjal J. Bærentsen til minnis

Týsdagin 30. mars andaðist gamli landsdjóralæknin Dánjal J. Bærentsen. Hann var ein sermerktur maður á so mangan hátt.

Dánjal var ættaður av Hellu í Kvívík, og tey, sum kendu hann, kallaðu hann tí Dánjal á Hellu. Foreldrini vóru Angelika, ættað úr Heimistovu í Kaldbak, og Hans Bærentsen, ættaður av Sundi og kallaður Hellubóndin. Angelika og Hans fingu tvey børn, Dánjal og Bodil, kallað Boda, sum búsettist í Danmark.

Angelika doyði ung av tuberklum. Systir hennara Jacobina, nevnd Bina, fór til Kvívíkar at halda hús. Hans giftist uppaftur við Binu, og eisini í hesum hjúnalagi vóru tvey børn, Tummas, sum er bóndi, og Hanus, sum er lækni.

Sum tað skilst varð Dánjal borin til garðin, men hann helt seg ikki til. Í einari útvarpssamrøðu einaferð segði hann, at fyri sær var ein hvítur seyður hvítur, og ein svartur seyður var svartur. Annan mun sá hann ikki á teimum.

Heldur enn at bóndast fór Dánjal til Havnar at ganga á studentaskúla, har hann tók prógv í 1942. Tað var málsligt studentsprógv, sum var tað einasta, skúlin hevði tá. Hóast Kvívík er lítil bygd, var hann ikki einasti kvívíkingur, sum tók studentsprógv hetta árið. Dánjal Magnussen, sum seinni gjørdist sakførari, var á sama liði.

Longu fyri kríggið var runnið saman millum Dánjal og Elsu Jensen úr Nýggjustovu í Kvívík. Hon fór í 1939 til Noregs á Háskúla, haðani til Danmarkar at tæna og var so ein av mongum føroyingum, sum lógu fastir í Danmark undir krígnum. Har lærdi hon til sjúkrasystir. Elsa var fróð kvinna og skald. Fleiri sálmar, sum hon hevur yrkt ella týtt, eru í Sálmabókini.

Heima í Føroyum var Dánjal eitt skifti vikarur í skúlanum í Kvívík. Men mest plagdi hann at siga frá einum øðrum arbeiði, hann hevði. Saman við Axel Tórgarð ferðaðist hann um landið og býtti gassmaskur út til fólk. Tá kom hann at kenna hópin av fólki, og tað kom honum til góðar seinni.

Í 1946 giftust Elsa og Dánjal. Tey fluttu til Danmarkar, har Dánjal las til djóralækna á Landbúnaðarháskúlanum, og hon starvaðist sum sjúkrasystir á Gentofte sjúkrahúsi. Tá hann hevði tikið prógv, fluttu tey til Jyllands, har hann fekk sær privatan praksis sum djóralækni. Elsa og Dánjal fingu fýra børn: Anniku, sum er lækni og gift við djóralæknanum Jústinus Olsen. Høgna, sum búsettist í Danmark. Og tvíburarnar Jógvan, sum er teldufrøðingur og er giftur við Noru, og Atu, sum doyði ung.



Í 1962 fekk Dánjal starv sum landsdjóralækni, og tey fluttu tí øll til Havnar at búgva. Í 1965 fluttu tey í nýggj hús á Frúutrøð. Elsa doyði í februar 2002.

Dánjal tók við starvinum eftir Carl Johan Bech. Tey nógvu fyrstu árini var Dánjal eins og undanmaðurin einasti djóralækni í landinum. Arbeiðsbyrðan vaks í hvørjum, og nú eru fleiri djóralæknar, sum hava privatan praksis, umframt landsdjóralæknan.

Sum djóralækni var Dánjal strangur, og onkuntíð fór hann í rættin við kravi um, at ólógliga innflutt dýr skuldi avlívast. Hann setti sær fyri at varðveita Føroyar sum eitt øki, har fáar djórasjúkur vóru. Tí var hann trekur at geva loyvi til innflutning av livandi dýrum, og tað hóvaði ikki øllum. Tann álvarsamasta samanbrestin hevði hann í seinnu helvt av sjeytiárunum, tá hann sum veterinerur myndugleiki harðliga mælti Landsstýrinum frá at geva loyvi til, at eini 100 neyt vórðu flutt inn. Hóast eitt skip fult av neytum kom úr Danmark til Føroya, stóð hann við sítt, og tað gjørdi Landsstýrið eisini. Endin var, at skipið noyddist avstaðaftur við farminum. Dánjal stúrdi serliga fyri, at neytini kundu hava ringorm.

Eisini var hann hart ímóti, at fólk ótarnað sluppu at flyta inn hundar og onnur húsdýr. Heldur ikki dámdi honum, at eitt nú ósviðin seyðarhøvd komu inn í landið ella til dømis hoyggj. Alt hetta kundi hava smittu við sær, segði hann. Í hansara tíð sum djóralækni komu kortini tvær sjúkur inn í landið, og tað harmaði hann nógv. Onnur var ridluskriði, sum helst var komin longu í 1961 - árið, tá ongin djóralækni var her - við seyði, sum varð fluttur inn úr Skotlandi. Hin sjúkan var garnasótt, sum eftir øllum at døma kom við skotskum seyðarhøvdum.

Dánjal á Hellu var ikki einans djóralækni. Hann var eisini mentamaður, hevði eina stóra og breiða vitan og var sera gløggur. Hann dugdi framúr væl føroyskt mál og hevði stóran ans fyri málinum. Tí var hann eisini ein teirra, sum Signar á Brúnni landsstýrismaður valdi í nevnd at gera uppskot um føroyska navnalóggávu.

Umframt alt hetta var hann eisini frásøgumaður sum fáur, skemtingarsamur og hugnaligur at vera saman við. Hann visti ótaldar søgur frá sínum gerandisdegi. Ein av teimum var hendan:

Tá hann sum ungur ferðaðist kring um í landinum og handaði fólki gassmaskur, var hann eisini í lítlari bygd í Norðoyggjum. Tá hann kemur til bygdina, møtir hann trimum gentum, allar í sama slag reyðpuntutum kjóla. Hann hyggur upp í vindeyguni á fyrstu húsunum. Har eru gardinurnar reyðpuntutar. Konan í húsinum er í reyðpuntutum turriklæði. Eisini í hinum húsunum eru gardinurnar reyðpuntutar, og konan í seinasta húsinum er í reyðpuntutum fyriklæði.

Tá dugir hann ikki at tiga meir, men ber hetta upp á mál við konuna og spyr, um fólk sita so væl um sátt her, at tey keypa alt í felag.

Ánei, sigur konan. Menn høvdu verið á útróðri. Á veg innaftur, komu teir fram á ein toybolt, sum rak á sjónum. Helst mundi hann vera av jólaskipinum.

20 ár seinni var Dánjal aftur í bygdini sum djóralækni. Nú var einki reyðpuntut at síggja, men tá hann spurdi, fekk hann at vita, at enn var nakað eftir av toynum. Ein kona, sum var flutt av bygdini, átti nakað.

Drúgvur toyboltur var! Og stuttligt var at hoyra ein góðan frásøgumann siga hesa og mangar aðrar søgur.

Dánjal J. Bærentsen var 87 ár, nú hann doyði. Hesi seinastu árini var hann mestsum blindur.

## Andlát

6. apríl
Albert Reinert úr Norðradali, 99 ár.
7. apríl
Petrea Mortensen Hvítanes-Tvøroyri, 78 ár.
8. apríl
Anna Elisabeth Joensen, vanliga nevnd Anna á Marknoyri, 75 ár.
Magnina Olesen, úr Sørvági, 88 ár.
9. apríl
Jacob Petur Petersen úr Porkeri, 57 ár.
11. apríl
Jacob Olivar Guttesen, ættaður úr Bø, 96 ár.
Maria Vang Nielsen, vanliga nevnd Maria oman tún, 84 ár.
12. apríl
Bette Joensen, vanliga nevnd Bette á Lambareiði, 88 ár.
13. apríl
Helena Dragaberg, fødd Veihe, ættað úr Porkeri, búsitandi í Klaksvík, 74 ár.
Elisabeth Margretha Mortensen av Sevmýru Tvøroyri, fødd Davidsen, ættað úr Æðuvík, 91 ár.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Finnleif Durhuus 35 ára starvsdag hjá Landsverkfrøðinginum

15. apríl 2004 vóru 35 ár síðani Finnleif Durhuus kom í starv hjá Landsverkfrøðinginum.

Finnleif er føddur og uppvaksin á Sandi. Hann kom til Havnar í 1959 og fór í læru sum timburmaður hjá Peturi í Gong. Frá 1964–66 arbeiddi hann sjálvstøðugt, samstundis sum hann gekk í skúla um kvøldarnar til tekniska fyrireiking, til hann fór til Danmarkar at lesa til byggifrøðing. Eftir loknan lesnað kom hann í starv hjá Landsverkfrøðinginum 15. apríl 1969. Ein hin fyrsta uppgávan hjá Finnleifi var at projektera nýggja vegin gjøgnum Kollafjørð og hevði hann eisini ábyrgdina av hesi vegagerð.



Í 1973 varð hann settur sum leiðari av vegaumsitingardeildini. Í ár 2000 varð nýggjur bygnaður gjørdur fyri stovnin og í hesum sambandi vórðu plan- og projektdeildin, ferðsludeildin og vegaumsitingardeildin løgd undir eina vegadeild, ið Finnleif varð leiðari av. Hann hevur verið í leiðslubólkinum fyri stovnin yvir 20 ár. Finnleif hevur eisini luttikið í norðurlendskum samstarvi. M.a. gjørdist hann í 1984 limur í NVF (Nordisk Vejteknisk Forbund). Síðani 1985 hevur hann umboðað stovnin á tí árliga norðurlendska driftschefsfundinum, har deildarstjórarnir á teimum norðurlendsku vegakervunum hittast at viðgera aktuel felags mál. Í 1992 gjørdist Finnleif eisini limur í norðurlendska vetrarhaldsbólkinum.

Síðani Finnleif byrjaði hjá LV eru stórar broytingar farnar fram í samfelagnum og eisini á stovninum. Tá ið hann byrjaði, vóru 12 fólk á skrivstovuni og í 1988 vóru tey yvir 90. Men kreppan rakti eisini stovnin og minkaði talið á starvsfólkum – eftir trimum árum – niður í eina helvt. Í sínum arbeiði er hann komin víða um í landinum og havt nógv samskifti bæði við kommunur, feløg og einstaklingar.

Samkoman í Ebenezer hevur verið hansara andaliga heim og er tað serliga innan sang, hann hevur verið virkin. Hann hevur verið í sangkórinum stórt sæð síðani 1960 og hevur eisini luttikið í øðrum sangbólkum, m.a. Sangbrøðrum, ið góvu sína fyrstu plátu út í 1966. Teir góvu 3 plátur út í 60'unum og eina endurútgávu til jólar í 2002. Hann hevur eisini verið organistur í Ebenezer í umleið 40 ár.

Finnleif er giftur við Jóhannu Mariu og eiga tey børnini Mikkjal, Kára og Ingunn.

## Maria Berg Jacobsen 80 ár

Mándagin 19. apríl, fyllir Maria Berg Jacobsen í Søldarfirði, 80 ár.

Maria er fødd í Froba, dóttir Olevinu f. Poulsen úr Norðragøtu og Jógvan Joensen undir Fossum í Froba.

Av teimum 8 systkjunum hjá Mariu, liva bert Lina og Elias. Lina er búsitandi í Íslandi og Elias býr í Havn.

Sum blaðung genta fór Maria til Syðrugøtu til Palla skræddara at læra at seyma, og í 1948 fór hon til Íslands, har hon starvaðist á seymistovu í eitt ár.

Í 1950 giftist hon við Leif Berg úr Søldarfirði, sum hon kom at kenna, meðan hon var í Gøtu og seymaði.

Tey fingu døturnar, Elmu, sum býr í Havn, Oðny, sum býr í Søldarfirði og Sunnuvu og Maluna, sum báðar búgva í Klaksvík. Maria eigur 8 ommubørn og 1 langommubarn.

Leif doyði í 1985, og í 1988 giftist Maria við Dávur Jacobsen úr Søldarfirði, har tey búgva í sera snotiliga heimi teirra.

Maria hevur stóran áhuga fyri ættarbondum og er sera familjukær og trúgv móti familju og vinum sínum. Hon gevur sær tíð at vitja gomul og einasamøll og minnist til fólk á føðingar- og merkisdøgum teirra.



Nakað eftir, at Maria misti mannin, fór hon á handilsskúlan, sum tá var í Gøtugjógv, at starvast í kantinuni. Har vann hon sær nógvar ungar vinir fyri lívið.

Maria er ein av teimum, sum við sínum smíli og fyrikomandi verumáta er við til at gera gerandisdagin lættari hjá teimum, hon møtir á síni lívsleið. Hon er sera vøkur kvinna og tað er nakað hábærsligt og virðiligt yvir henni.

Mariu verður ynskt hjartaliga tillukku á stóra degnum og Harrans signing á lívskvøldinum.

Føðingardagurin verður hildin í Elim í Søldarfirði sunnudagin, 18. apríl frá klokkan 17.

Móttøka

Í sambandi við stjóraskifti í P/F Fjarhitafelagnum, verður almenn móttøka á Hotel Hafnia, Parnassinum fríggjadagin 23. apríl 2004 frá kl. 15 til kl. 18.

Høvi verður at hitta nýggja stjóran Hans Christian Dam, sum tók við starvinum 1. mars 2004, og undanfarna stjóran Jóannes Hansen, ið hevur røkt hetta starv, síðani Fjarhitafelagið varð stovnað.

P/F Fjarhitafelagið

i
Sosialurin

## Dagurin

**17. apríl. Anicetus**, deyður umleið ár 166. Hann var pávi. Í Føroyum hevur mansnavnið Setus verið brúkt.

**18. apríl. Eleuterius**, biskupur í Illýriu, tikin av døgum um leið ár 200. Dagurin verður eisini skrivaður Elenterius.

**19. apríl. Dánjal**. Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti.
Bíbilska navnið merkir *Guð er dómari mín.*

## Prógv

Guðrið Eriksdóttir Johansen, Tvøroyri, hevur við lærda háskúlan í Keypmannahavn lokið prógv sum cand.scient í havalisfrøði.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta stóru samkenslu
og hjálpsemi, ið varð sýnt okkum, tá ið okkara góða
mamma, vermamma, omma, langomma
og olduromma

**Johanne Sofie Johannesen**

vanliga nevnd Boys-Hanna í Miðvági

doyði og varð jarðað.

Takk tit, sum vitjaðu hana og vóru um hana
á Ellisheiminum.
Takk til starvsfólkini á Ellisheiminum fyri hjálp
og umsorgan og at tit tóku tykkum so væl av henni.
Takk til David Johanensen, prest, fyri góð og troystarrík
orð á Ellisheiminum og í kirkjuni.
Takk til kirkjutænararnar og til Theodor Petersen
fyri vakra sangin í kirkjuni.
Takk tit mongu, sum hjálptu til við ymiskum
til jarðarferðina.
Takk fyri kransar, blómur og peningagávur
til frama fyir búfólkini á Ellisheiminum í Miðvági.
Takk til sangarar, berarar og til tykkum øll,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað
her á fold.
Hjartans tøkk øll somul.

**Børnini**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og
hjálpsemi, tá okkara góða mamma, vermamma,
omma, systir og svigarinna okkara

**Margretha Eidesgaard**
**Eiði**

andaðist og varð jarðað

Ein serlig tøkk til tykkum á B6 fyri tykkara umsorgan.
Tøkk til Emil Olsen prest fyri troystarrík orð
í kapellinum og í kirkjuni, og til organist, klokkara,
sangarar, berarar og gravarar. Tøkk til tykkum, sum
hjálptu til við ervinum

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Eiðis kirkju og
til tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta
hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Piddi, Anna Elisabeth og Jákup Eli við familju**